## Pornokongar keypt West Ham

David Sullivan og David Gold, sum báðir hava forvunnið sær milliardir innan blað- og pornoídnaðin, keyptu í gjár meirilutan av partabrøvunum í West Ham. London-felagið hevur leingi verið í fíggjarliga tungum sjógvi, og íslendsku eigararnir hava ikki havt orku at lyfta byrðuna, síðani íslendski búskapurin skrædnaði. Nú hava teir báðir nýggju eigararnir boðað frá, at teir hava eina sjeyára ætlan, sum skal lyfta West Ham millum tey bestu í Onglandi. Áður áttu teir báðir Birmingham í 16 ár, men serliga David Sullivan duldi ongantíð, at hjartað hjá honum altíð hevur verið hjá West Ham.



## Punktum sett í Paris-málinum

Dómurin, sum varð feldur í Føroya Rætti, staðfesti, at KÍ skal gjalda fyrrverandi venjaranum beint oman fyri hálva millión í endurgjaldi, rentum og sakarmálskostnaði. Tann dómin hevur KÍ góðtikið, og í gjár fekk felagið váttan fyri, at hetta eisini er góðtikið sum endalig avkláring frá Tony Paris. Úr KÍ verður sagt, at tey nú royna at troyta øll mið, soleiðis at peningurin, sum skal gjaldast, er tøkur til fríggjadagin í hesi vikuni. Bæði KÍ og Sp/f KÍ høvdu góð fíggjarlig úrslit í fjør, men fyri tað nógva fór hesin vinningur til at gjalda gamla skuld. Og tí vónar felagið, at tað eisini ber til at fáa nakað av peningi frá mongu góðu stuðlunum, sum altíð hava verið kring felagið.

# Noreg tapti tepurt

### Noreg kom framum í seinna hálvleiki ímóti Kroatia, men megnaði ikki at halda leiðsluna




Heri Simonsen




Noreg tapti EM-dystin í bólki A ímóti Kroatia 23-25. Kroatia var á odda 11-10 í steðginum.

Noreg og málverjin, Steinar Ege, byrjaðu væl, og var Noreg á odda 3-1, tá 10 minuttir vóru farnir. Men tá 20 minuttir vóru farnir, kom Kroatia á odda 7-6.

## Løgdu seg á odda

Kroatia økti til 15-12 tíðliga í seinna hálvleiki, men so kom besta løtan hjá norðmonnum, tá liðið vendi 12-15 til eina 16-15 leiðslu. Men tá norska liðið hevði minst brúk tí, fyri fekk Kjetil Strand eina útvísing, og Kroatia megnaði at gagnnýta yvirtalsstøðuna.

Noreg stríddist væl, men Kroatia var omaná við tveimum málum, tá alt var liðugt.

Håvard Tveten gjørdist toppskjútti hjá Noregi við níggju málum. Erland Mamelund fekk fýra, meðan Kjetil Strand og Frank Løke fingu trý mál í part.

Russland vann 37-33 ímóti Ukraini, so nú er longu talan um mótbrekku hjá Noregi. Hósdagin klokkan 19.10 spælir Noreg ímóti Russlandi.

Norski málverjin, Steinar Ege, byrjaði væl ímóti Kroatia, men tá avtornaði, vóru kroatar tvey mál betri

# Svøríki misti alt

### Svenskarar vóru á odda við seks málum í steðginum, men stóðu eftir við ongum




Heri Simonsen

Svøríki tapti 25-27 ímóti Slovenia, hóast Svøríki var á odda 13-7 í steðginum. Svøríki fekk eina dreymabyrjan.

Tá 10 minuttir vóru farnir, var Svøríki á 6-0, og svenskarar hildu hendan munin til steðgin. Svenski málverjin, Dan Beutler stóð eisini sera væl í fyrra hálvleiki.

Slovenia kom betri við í seinna hálvleiki, men Dan Beutler hevði fleiri bjargingar, og tá hann bjargaði einari slovenskari skotroynd við støðuna 21-19 til Svøríki, hildu svenskarar, at nú var sloppið. Men so var ikki.

Slovenia javnaði til 25-25, og tá 40 sekund vóru eftir, løgdu slovenar seg á odda 26-25, og øktu teir til 27-25 beint áðrenn seinasta bríksl.

## Standa spyrjandi

– Eg skilji ikki hvat tað er, sum hendir. Vit eru á odda allan dystin, so hetta er ræðuliga súrt. Men vit kunnu bara skylda upp á okkum sjálvar, segði Oscar Carlén við svensku sjónvarpsstøðina, TV4, aftan á dystin.

Málverjin, Dan Beutler, var eisini vónsvikin. - Hetta er eitt tungt tap. Vit høvdu sigurin á hondum, og áttu at vunnið. Eg veit ikki hvat hendi í seinna hálvleiki, segði Dan Beutler.

Jonas Källman, Niclas Ekberg, Tobias Karlson og Dalibor Doder skutu allir fimm mál fyri Svøríki.

Pólland vann 27-25 á Týsklandi, og í dag klokkan 19.30 spælir Svøríki ímóti Póllandi. Klokkan 17.30 spælir Slovenia ímóti Týsklandi.




Svøríki misti í evstu løtu alt, tá tað ikki eydnaðist at halda slovenum í avgerandi løtuni

## EM-kappingin 2010

| | | |
|---|---|---|
| **Bólkur A** | | |
| 19/01 | **Russland-Ukraina** | **37-33** |
| 19/01 | **Kroatia-Noreg** | **25-23** |
| 21/01 | Ukraina-Kroatia | 17.10 |
| 21/01 | Noreg-Russland | 19.10 |
| 23/01 | Kroatia-Russland | 17.10 |
| 23/01 | Noreg-Ukraina | 19.10 |
| **Bólkur B** | | |
| 19/01 | **Danmark-Eysturríki** | **33-29** |
| 19/01 | **Ísland-Serbia** | **29-29** |
| 21/01 | Eysturríki-Ísland | 17.00 |
| 21/01 | Serbia-Danmark | 19.15 |
| 23/01 | Eysturríki-Serbia | 17.00 |
| 23/01 | Danmark-Ísland | 19.15 |
| **Bólkur C** | | |
| 19/01 | **Týskland-Pólland** | **25-27** |
| 19/01 | **Svøríki-Slovenia** | **25-27** |
| 20/01 | Slovenia-Týskland | 17.30 |
| 20/01 | Pólland-Svøríki | 19.30 |
| 22/01 | Týskland-Svøríki | 17.15 |
| 22/01 | Pólland-Slovenia | 19.15 |
| **Bólkur D** | | |
| 19/01 | **Spania-Kekkia** | **37-25** |
| 19/01 | **Frakland-Ungarn** | **29-29** |
| 20/01 | Kekkia-Frakland | 17.15 |
| 20/01 | Ungarn-Spania | 19.15 |
| 22/01 | Frakland-Spania | 17.15 |
| 22/01 | Ungarn-Kekkia | 19.15 |